# Betri Banki og lóggávan móti hvítvasking og fígging av yvirgangsvirksemi

Betri Banki ynskir at vera við til at forða fyri hvítvasking og fígging av yvir¬gangsvirksemi. Galdandi lóggáva setir strong krøv á hesum økinum, og hesum reglum ynskja vit sjálvsagt at fylgja í Betri Banka. Útyvir lógarreglurnar, hevur nevnd bankans eisini ásett og verksett politikk á hesum øki.

**Hvat er hvítvasking og fígging av yvirgangsvirksemi?**

Hvítvasking umfatar eina røð av gerðum, sum allar hava til endamáls fjala út yvir ólógliga upprunan av einhvørjari peningaupphædd, soleiðis at tað skal sýnast sum peningurin er útvegaður á lógligan hátt. Ella sagt á ein annan hátt: tað er at "vaska" svartan pening hvítan.

Fígging av yvirgangsvirksemi er at nýta pening, útvegaður á lógligan ella ólógligan hátt, til at fíggja ella stuðla yvirgangsvirksemi.

**Kenn Tín Kunda-ásetingin**
Lóggávan viðvíkjandi hvítvasking og fígging av yvirgangsvirksemi umfatar eisini "Kenn Tín Kunda", sum eru nágreinlig krøv til bankan til staðfesting og skjalfesting av samleika hjá øllum kundum. Tískil hevur bankin tørv á avrit av samleikaprógvi (t.d. pass), upplýsingar um bústað og P-tal (persónstal) hjá kundunum.

Afturat heusm skal bankin kenna endamálið hjá kundanum, tá hann ynskir at gerast kundi í Betri Banka. Kundarnir verða tí bidnir um at svara ávísum spurningum, ið skulu lýsa endamálið við at stovna eitt kundasamband við bankan.

Ábyrgdin hjá Betri Banka, tá tað snýr seg um "Kenn Tín Kunda", fevnir um allar verandi eins og møguligar nýggjar kundar.

**Mannagongdir settar í verk í Betri Banka**
Fyri at lúka galdandi lóggávu viðvíkjandi hvítvasking og fígging av yvirgangsvirksemi hevur Betri Banki innanhýsis mannagongdir og skipanir, sum skulu forða fyri at slíkt virksemi kann fara fram.

Øll starvsfólk í Betri Banka skulu árliga venja sín kunnleika til lóggávu og fyriskipanir í samband við hvítvasking og fígging av yvirgangsvirksemi. Starvsfólkini í Betri eru á henda hátt væl kunnað og fyrireikað til at avgera ella meta um, hvørt talan er um eina møguliga roynd at hvítvaska pening ella at fíggja yvirgangsvirksemi. Betri Banki hevur eisini mannagongdir, ið áseta, hvussu starvsfólkini eiga at handfara ávísar støður.

Bankin hevur automatiskar fráboðanarskipanir, innanhýsis eftirliti, váðastýring og samskifti við myndugleikar, alt fyri at forða fyri og fyribyrgja virksemi í samband við hvítvasking og fígging av yvirgangsvirksemi.
Um illgruni tekur seg upp um hvítvasking ella fígging av yvirgangsvirksemi, hevur Betri Banki ábyrgd av at seta seg í samband við løgregluna. Løgreglan ger niðurstøðu um, hvørt talan er um brot á lógina.

**Betri Banki**

betri

**Betri Banki P/F**
Postboks 34
Yviri við Strond 2
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 348 000
banki@betri.fo
www.betri.fo